

# USA kemur at minka um oljuframleiðsluna, sambært OPEC

**Jógvan Hugo Gardar**

14.10.2015 - 09:34

Oljan.fo

Oljuframleiðandi londini í OPEC hava gjør teina greining av gongdini í oljumarknaðinum komandi mánaðirnar. Niðurstøðan er at londini uttanfyri OPEC koma at framleiða minni av olju. Serliga er tað USA sum kemur at minka um sína framleiðslu í 2016.

OPEC metir at heimsframleiðslan av olju kemur at minka í 2016, og at minkingin serliga kemur uttanfyri OPEC. Financial Times skrivar at OPEC lækkar sína meting av hvat londini uttanfyri felagsskapin framleiða við 200.000 føtum av olju um dagin í 2015 og 500.000 føtum av olju um dagin í 2016.

Í greiningini verður sagt at USA kemur at minka sína framleiðslu við heili 630.000 føtum av olju um dagin. Tað er serliga minkandi framleiðslan av skiferolju sum liggur í hesum talinum. Orsøkin er at minni verður gjørt av íløgum í hesa framleiðsluna.

OPEC-londini við Saudi-Arabia á odda hava ikki minka um sína framleiðslu, og tey hava heldur ongar ætlanir um tað.